# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 26.01.2026 kl. 16.30

Á fundi: Janus Thomsen
Poul Laust Christiansen
Rakul Mørk
Jónfinn L. Poulsen
Eir J. Norðberg (fyri Jóhannes Liasson Rasmussen)
Thorstein Thomsen (fyri Otto West)

Ikki møtt: Jóhannes Liasson Rasmussen
Otto West
Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-43-2025: Umsókn um fíggjarligan stuðul 2026 frá bóltfelagnum ROYN.**

   Søkt verður um stuðul til felagið, so tey framhaldandi kunnu skapa og skipa fyri ymiskum tiltøkum til frama fyri trivnaðin í sóknini, serliga millum børn og ung.

   **Trivnaðarnevndin 25.08.2025:**

   Nevndin mælir til at stuðla við kr. 125.000,00 eins og undanfarna ár.

   **Fíggjarnevndin 25.08.2025:**

   Samtykt varð einmælt at mæla til at stuðla við kr. 125.000,00.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

2. **102-7-2026: Umsókn um marknaumskipan – matr. nr. 213a og 213f, Hvalba.**

   Søkt verður um, at matr. nr. 213a letur umleið 190 m2 til matr. nr. 213f, Hvalba.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini um marknaumskipan.

3. **102-75-2025: Tilboð frá KJ um umbýti av maskinu TB210R.**

   Tilboðið frá KJ Hydraulik P/F uppá umbýti av maskinuni TB210R er á kr. 80.000,00. Umbýtið av maskinu er við á fíggjarætlanini fyri 2026.

   **Tekniska nevnd 08.12.2025:**

   Nevndin mælir til at taka av tilboðnum.

   **Fíggjarnevndin 08.12.2025:**

   Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum kr. 80.000,00.

<u>**Avgerð**</u>**:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

4. <u>**102-77-2025: Skriv frá hagastýrinum fyri Grímsfjall**</u>**.**
Skriv viðvíkjandi endurgjaldi fyri mist bit á matr. nr. 524b og 524x. Sambært Búnaðarstovuni er gjaldið fyri mist bit av ódyrkaðum lendi/haga kr. 0,70 pr. m2.
**Tekniska nevnd 23.01.2026:**
Nevndin mælir til at bjóða kr. 0,70 pr. m2.
**Fíggjarnevndin 26.01.2026:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at gjalda kr. 0.70 pr. m2 ella íalt kr. 13.124,30.
<u>**Avgerð**</u>**:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

5. <u>**102-5-2025: Kostnaðarmeting – liðuggerð av bingjuplássinum í Hvalba**</u>**.**
Kostnaðarmeting fyri at liðuggera bingjuplássið í Hvalba er mettur til kr. 457.047,00.
**Tekniska nevnd 23.01.2026:**
Nevndin mælir til, at nevnda upphædd verður játtað.
**Fíggjarnevndin 26.01.2026:**
Samtykt varð einmælt at lata bygdaráðið taka støðu til málið.
<u>**Avgerð**</u>**:**
Samtykt varð einmælt at beina málið aftur í Teknisku nevnd.

6. <u>**102-4-2026: Avtala við Prestfjall s.p. um moldgoymslu – leingjan**</u>**.**
Verandi avtala um brúksrætt til moldgoymslu í Prestfjalli matr. nr. 528a, gekk út tann 31.12.2025.
**Tekniska nevnd 23.01.2026:**
Nevndin mælir til at søkja friðingarmyndugleikarnar um leingjan av loyvinum.
**Fíggjarnevndin 26.01.2026:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við at leingja avtaluna og søkja friðingarmyndugleikarnar um loyvi hesum viðvíkjandi.
<u>**Avgerð**</u>**:**
Einmælt samtykt.

7. <u>**Ikki almenn mál**</u>**.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.30

Janus Thomsen Poul Laust Christiansen Rakul Mørk Jónfinn L. Poulsen

Eir J. Norðberg Thorstein Thomsen